Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 15. mars 2023
Mál nr.: 23/06898
Málsviðgjørt: jd

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 1. Í sambandi við framleiðslu av filmum, sendirøðum og heimildarfilmum í Føroyum, kann upp til 25% av framleiðslukostnaðinum verða afturborin.	**§ 1**. Fyri filmar, sendirøðir og heimildarfilmar, sum verða framleidd í Føroyum, verða 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, afturbornar, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri at fáa afturbering. Afturberingin er í mesta lagi 5 milliónir kr., sbr. tó stk. 2. *Stk. 2*. Fer afturberingin upp um 5 milliónir kr., kann upphæddin, ið er oman fyri 5 milliónir kr., berast aftur, um játtan til hetta fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini. *Stk. 3*. Í seinasta lagi 15. august á hvørjum ári ger Filmshúsið eina skikkaða meting av verkætlanum, sum væntandi verða framdar í komandi fíggjarári.
§ 2. Afturbering kann verða latin, tá talan er um framleiðslu av filmi, sendirød ella heimildarfilmi, tá framleiðslan heilt ella lutvíst fer fram í Føroyum, og tá framleiðslan er ætlað til breiða almenna útbreiðslu.	**§ 2**. Afturbering eftir § 1 kann verða latin filmum, sendirøðum ella heimildarfilmum, sum heilt ella partvíst verða framleidd í Føroyum, og sum eru ætlað almennari útbreiðslu.

Stk. 2. Framleiðsla av lýsingum, tíðindum, veruleikasendingum og undirhaldssendingum og ítróttarsendingum er ikki fevnd av rættinum til afturbering.	*Stk. 2*. Lýsingar, tíðindi, veruleikasendingar, undirhaldssendingar og ítóttarsendingar hava ikki rætt til afturbering eftir hesi løgtingslóg.
§ 6. Framleiðslan skal lúka hesi krøv fyri at fáa afturbering av parti av útreiðslunum: 1) Framleiðslan skal fara heilt ella lutvíst fram í Føroyum. a) Framleiðslan skal vera við til at menna listarliga og tøkniliga vitan og førleikar í føroysku filmsvinnuni. b) Fíggjarætlanin fyri framleiðsluna skal vísa nýtslu av góðkendum útreiðslum í Føroyum á í minsta lagi 500.000 kr. (...) *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um krøv til nýtslu av føroyskum fakfólki og førleikum í framleiðsluni, sbr. stk. 1, nr. 1.	**§ 6.** Framleiðslan skal lúka hesi krøv fyri at fáa afturbering av parti av útreiðslunum: 1) Framleiðslan skal fara heilt ella lutvíst fram í Føroyum. a) Framleiðslan skal vera við til at menna listarliga og tøkniliga vitan og førleikar í filmsvinnuni í Føroyum. b) Fíggjarætlanin fyri framleiðsluna skal vísa, at í minsta lagi 500.000 kr. eru brúktar til útreiðslur, sum eru fevndar av § 8. (...) *Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fakfólk og førleikar í Føroyum skulu brúkast í framleiðsluni, sbr. stk. 1, nr. 1.